## Samstarvsavtala við Søfartens Ledere

Stórt tal av føroyskum navigatørum sigla í danska handilsflotanum. Nógvir av hesum eru fyrrverandi limir hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag. Á aðalfundi felagsins millum jóla og nýggjárs segði formaðurin, Eyðstein Djurhuus, at FSN javnan fær fyrispurningar frá fyrrverandi limum, sum nú eru í Søfartens Ledere, um ymisk viðurskifti. – Hetta eru eitt nú spurningar um skatta- og almannamál og spurningar um útbúgving og vinnubrøv. FSN vil sjálvsagt hjálpa eftir førimuni. Eyðstein segði, at danska Navigatørfelagið, sum nú eitur Søfartens Ledere, hevur 203 virknar limir, sum búgva í Føroyum. - Tað kann verða torført at meta um, hvussu nógvir føroyskir navigatørar sigla undir DIS, men eitt tal uppá 500 er helst ikki av leið. Hetta sigur okkum, at nógvir ikki eru limir í fakfelag og soleiðis spæla fríspæl, men fáa fyrimunirnar av, at onnur gjalda fyri at hava ein skipaðan sáttmála, segði Eyðstein Djurhuus, sum legði aftrat, at FSN og Søfartens Ledere seinastu tíðina hava arbeitt við at gera eina samstarvsavtalu, sum skal gagna limunum í báðum feløgunum.



*Óli Breckmann sigur, at høvdu vit ikki havt fólk sum Aksel Hansen, hevði føroyska samfelagið ikki verið so ríkt, og tað hevði heldur ikki verið so fjølbroytt og fjølment, sum tað er í dag*

*Mynd: Jan Müller*

# Aksel Hansen hevur ríkað føroyskt vinnulív

**- Høvdu vit ikki havt fólk sum Aksel, hevði føroyska samfelagið ikki verið so ríkt, og tað hevði ikki verið so fjølbroytt og fjølment, sum tað er í dag, segði Óli Breckmann við móttøku, tá vinnulívsmaðurin, Aksel Hansen, fylti 85 ár beint fyri jól**

VINNULÍV

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin 20. desember fylti vinnulívsmaðurin, Aksel Hansen í Havn, 85 ár. Tó at flestu úti um landið best kenna navnið í sambandi við vinnu, hevur Aksel at kalla alt sítt lív eisini havt stóran áhuga fyri rossum og hevur verið sera virkin innan Ríðingarfelagið, sum hann saman við øðrum var við til at stovna hin 25. februar í 1943. Aksel eigur eisini sín stóra lut í, at reiðfólk í síni tíð fingu síni høli til rossini.

Føðingardagurin hjá Akseli byrjaði við, at fleiri enn fimmti reiðfólk í skrúgongu á rossabaki komu oman til stallin hjá Akseli undir Norðrasta Horni, har tey fingu gløgg og okkurt annað leskandi.

Úr stallinum hjá Akseli bar leiðin í felagshúsið hjá Føroya Ríðingarfelag á økinum hjá felagnum í Havnardali, har skipað varð fyri borðhaldi, og røður vórðu hildnar.

Móttøkan í sambandi við dagin hjá vinnulívs-og reiðmanninum var tí rættiliga serstøk.

### Fleiri røður

Í felagshølunum í Havnardali bóru fólk, sum komin vóru saman at heiðra Aksel, fram røður og heilsanir.

Eitt nú bóru formaðurin í Føroya Ríðingarfelag, Hans Vilhelm Lützen og Svenning Reinert, sum eisini er gamal í garði, fram røður.

Óli Breckmann helt eisini eina røðu, har hann serliga legði dent á Aksel, sum hin ótroyttiliga og framúrskarandi vinnulívsmannin.

Hans Vilhelm vísti á, at hetta er ein stórur dagur, har høvi er at heiðra sjálvum stovnaranum av felagnum ein slíkan dag.

- Aksel hevur gjørt nógv fyri felagið og ungdómin hjá felagnum. Hann tók okkum við á túrar og lærdi okkum gøtur og staðarnøvn. Hann hevur verið fantastiskur fyri felagið, segði formaðurin í Føroya Ríðingarfelag.

Svenning Reinert, ið hevur havt áhuga fyri rossum, síðan hann var smádrongur, segði, at Aksel Hansen í sínum starvi sum virkisstjóri og reiðari hevur dugað væl at kopla frá, sum hann tók til, og hann legði aftrat, at Aksel hevur verið ein framúrskarandi maður.

### Gingu undan

Óli Breckmann segði, at tað fyrsta, hann minnist til navnið Aksel Hansen, var, tá tey heima við hús hjá teimum tosaðu um hesar Hansen-brøðurnar.

- Vit sótu kanska og fingu okkum ein drekkamunn – og so nevndi pápi hetta dynastiið, sum var so serligt og merkisvert. Haraftrat hevði tað so stóran týdning fyri okkara samfelag. Hesir fimm brøðurnir, sum fylgdu pápanum eftir, høvdu verið við til at gjørt Havnina og Føroyar til eitt nógv betri og ríkari pláss.

Óli segði seg eisini minnast, tá teir sum 12-13 ára gamlir dreingir fyrstu ferð skuldu til arbeiðis.

- Tað var altíð eitt ivamál, um vit sluppu uppí. Eg veit ikki, hvør gav boðini, men altíð var pláss fyri nøkrum av okkum, legði hann aftrat.

Hann segði, at ofta vóru teir fleiri hundrað, sum soleiðis fingu lummapengarnar um summarið, og sum lærdu at arbeiða fyri fyrstu ferð.

- Vit lærdu eisini at virða týdningin av tí handligа arbeiðnum – og týdningin av okkara høvuðsvinnu, segði hann.

### Stórt treysti

Óli Breckmann segði, at Aksel Hansen hevur verið ómetaliga treystur sum vinnulívsmaður.

- Summi fólk skína eitt stutt tíðarskeið, kanska eini tvey ella trý skeið í lívinum – alt eftir, hvat tey fáast við.

Hann vísti á, at Aksel hevur fingist við fiski-og sjóvinnu til hendan dag.

- Eg vænti, at hann hevur verið líka so treystur sum vinnulívsmaður sum rossamaður í okkara býi og okkara samfelag.

Óli legði dent á, at høvdu vit ikki havt fólk sum Aksel og hansara, hevði føroyska samfelagið ikki verið so ríkt, og tað hevði heldur ikki verið so fjølbroytt, sum tað er í dag.

- Føroyar høvdu heldur ikki verið so fjølmentar, sum tær eru í dag. Tí standa vit sum borgarar í ómetaliga stórari skuld til júst sum menn sum Aksel Hansen, segði hann.

### Trygg grund

Óli Breckmann, sum dugir at taka til, legði aftrat: